# Hvørki vil vera favorittur

**KVINNUFLOGBÓLTUR**

## Kvinnufinalan millum SÍ og Mjølnir stendur eftir øllum at døma púra opin, tí hvørki liðið vil hava favorittspjaldrið sett á seg, nú steypaheiðurin stendur upp á spæl

Hilmar Jan Hansen




*Í vetur hevur Mjølnir havt gott tak á SÍ, men í einari finalu kann alt henda. Mjølnir er besta liðið í Eik-liguni í løtuni, men hinvegin hava spælararnir hjá SÍ fleiri finaluroyndir*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Skulu vit trúgva liðformonnunum, so vil hvørki av liðunum vera favorittur í kvinnufinaluni, hóast SÍ er í finaluni fjórða árið á rað og hevur vunnið tvær tær síðstu, og Mjølnir er fremst í landskappingini og hevur havt takið á SÍ í vetur:

– Vit eru ikki favorittar upp á nakran máta, tí Mjølnir hevur vunnið á okkum tríggjar ferðir hetta kappingarárið, sigur Karin Mikkelsen í SÍ.

– Vit halda ikki, at vit eru favorittar, tí SÍ hevur roynt hetta so ofta, og bert fáar á okkara liði hava yvirhøvur verið í einari finalu fyrr, sigur Eina S. Kalsø í Mjølni.

### Trúgva upp á tað

Hyggja vit at hagtølunum, kann SÍ vinna finaluna triðja árið á rað, og helst vilja sørvágskvinnur leggja nógv fyri, tí tær fyribils síggja út til at vera yvirhálaðar av bæði Mjølni og Fleyr í Eik-liguni.

– Hjá okkum snýr tað seg um at spæla og hava tað stuttligt. Vit trúgva sjálvandi upp á tað, og hóast tað skilst á øllum brøgdum, at verri enn so øll vænta tað stóra av okkum, kunnu vit vinna, sigur Karin Mikkelsen, ið vónar, at sørvingar koma fjølmentir til Havnar at stuðla liðnum.

– Tað hevur gingið eitt sindur so sum so og vit hava manglað tað, vit eru mest kendar fyri, nevniliga spæligleðina. Men nú gongur aftur betur, so tí fara vit á vøllin við positivum hugburði.

### Spentar til finaluna

Mjølnir hevur ikki verið í finaluni síðstu fimm árini, men hevur í løtuni eitt sterkt lið við spælarum, ið mestsum allir kunnu avgera bóltarnar. At flestu av spælarunum ongantíð fyrr hava spælt í steypafinaluni, heldur Eina ikki hava so nógv at siga:

– Sjálv sat eg á bonkinum, tá Mjølnir var í finaluni í 2005, og bara fáar á liðnum hava roynt hetta fyrr. Men fyri tað eru vit ikki nervøsar, men heldur spentar, tí vit halda okkum hava ein ordiliga góðan kjans, sjálvt um tað kann fara báðar vegir, sigur Eina S. Kalsø.

– SÍ hóskar væl til okkum, tí spælararnir eru ikki so høgir, og tí er blokkurin ikki so góður, men hinvegin eru tær í SÍ sterkar á gólvinum. Vit vænta at fáa nógvar stuðlar við okkum, tí í síðstuni hava vit havt væl fleiri áskoðarar enn vanligt.

hilmarjan@sosialurin.fo

### Steypafinalur hjá kvinnum 2000 - 2010

| ÁR | LIÐ | ÚRSLIT | SETTÚRSLIT |
|---|---|---|---|
| 2000 | Mjølnir-Dráttur | 2-0 | (21-16, 21-16) (21-18, 24-22) *) |
| 2001 | Mjølnir-Dráttur | 3-2 | 17-25, 17-25, 25-23, 25-15, 19-17 |
| 2002 | TB-Mjølnir | 3-1 | 25-18, 25-23, 13-25, 25-22 |
| 2003 | TB-ÍF | 3-1 | 25-17, 24-26, 27-25, 25-20 |
| 2004 | TB-Dráttur | 3-1 | 25-11, 20-25, 25-16, 25-19 |
| 2005 | Mjølnir-TB | 3-1 | 25-20, 25-21, 13-25, 25-19 |
| 2006 | TB-ÍF | 3-1 | 32-30, 25-19, 23-25, 25-16 |
| 2007 | Dráttur-KÍF | 3-2 | 19-25, 25-19, 21-25, 25-08, 15-13 |
| 2008 | ÍF-SÍ | 3-0 | 25-12, 25-17, 25-21 |
| 2009 | SÍ-Fleyr | 3-1 | 25-19, 25-21, 22-25, 30-28 |
| 2010 | SÍ-Dráttur | 3-2 | 22-25, 25-15, 21-25, 25-17, 15-9 |

**) Í 2000 var spælt eftir Nordic Score-skipanini*

# Oddalið og avbjóðari møtast

**MANSFLOGBÓLTUR**

## Hóast ÍF hevur verið einaráðandi í landskappingini, hava fleiri jøvn og spennandi sett verið ímóti Mjølni, so steypafinalan kann saktans gerast meira spennandi enn stigatalvan

Hilmar Jan Hansen




*ÍF hevur vunnið á Mjølni fimm ferðir í vetur, men nógv av settunum hava verið jøvn og spennandi*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Hagtølini frá undanfarnum árum peika ymsar vegir, nú ÍF og Mjølnir møtast í steypafinaluni. ÍF hevur vunnið greipuna tríggjar ferðir, í 2001, 2003 og 2009, men hinvegin vann Mjølnir bæði í 2007 og 2006 steypafinaluna á ávikavist ÍF og Fleyr, ið blivu meistarar tey árini.

Á báðum liðum eru spælarar, sum eru vanir við steypafinalur, tí Mjølnir var í finaluni í fjør og í 2008, og ÍF var í finaluni í fyrraárið og 2007. Hetta er áttanda finalan hjá Mjølni, sum tríggjar ferðir hevur verið steypavinnari, og ÍF, sum er við fyri sjeyndu ferð, hevur vunnið finaluna fýra ferðir.

### Nógv jøvn sett

– Vit sleppa neyvan undan at roknast sum stórfavorittar, og tí renna vit heldur ikki undan. Men hetta er ein finala, har alt kann enda, sigur Rúni Weihe, liðformaður hjá oddaliðnum, ÍF, sum í Eik-liguni er heili sjey stig framman fyri Mjølnir, ið er sterkasti avbjóðarin.

Sunnudagin máttu fimm sett til í landskappingardystinum teirra millum, áðrenn ÍF hevði vunnið, og í vetur hava settúrslit sum 31-29, 30-28, 29-27 og 28-26 verið at sæð millum ÍF og Mjølnir, men kortini hevur ÍF vunnið hvørja ferð.

– Vit hava virðing fyri klaksvíkingum, men ræðast teir ikki. Í allan vetur hava vit havt takið á Mjølni, og gera vit, sum vit hava gjørt, eiga vit at vinna, sigur Rúni, ið saman við liðfeløgunum bara ta einu ferðina hevur tapt fyri Mjølni. Tað var í innleiðandi umfarinum í Fleyr-kappingini, har ÍF ikki kom víðari, men Mjølnir endaði sum vinnari.

### Sær ljóst upp á tað

At bara tveir bóltar hava verið á muni millum ÍF og Mjølnir í sjey av teimum 19 settunum, liðini hava spælt ímóti hvørjumøðrum í vetur, vil liðformaðurin hjá Mjølni fegin brúka til egnan fyrimun:

– Sjálvt um vit hava tapt dystirnar, haldi eg, at vit hava rímiliga gott tak á teimum. Teir hava verið sera støðugir í vetur, men um vit kunnu taka tað besta frá undanfarnu dystunum við okkum inn á vøllin, síggi eg avgjørt ljóst upp á tað, sigur Thorvald Danielsen.

– Satt at siga, so haldi eg slett ikki, at ÍF er so nógv betri enn vit. Sunnudagin skuldu vit havt koppað teimum, men gjørdu tað ikki, so kanska vit nú gera tað í steypafinaluni í staðin.

hilmarjan@sosialurin.fo

### Steypafinalur hjá monnum 2000 - 2010

| ÁR | LIÐ | ÚRSLIT | SETTÚRSLIT |
|---|---|---|---|
| 2000 | Mjølnir-Fleyr | 2-1 | (21-17, 15-21, 7-2) (16-21, 20-22) (15-10) *) |
| 2001 | ÍF-Mjølnir | 3-0 | 25-17, 25-20, 25-15 |
| 2002 | SÍ-ÍF | 3-0 | 25-15, 26-24, 25-14 |
| 2003 | ÍF-SÍ | 3-2 | 25-21, 23-25, 25-16, 21-25, 15-13 |
| 2004 | ÍF-SÍ | 3-0 | 25-17, 25-22, 25-20 |
| 2005 | SÍ-Mjølnir | 3-0 | 25-18, 25-18, 25-23 |
| 2006 | Mjølnir-Fleyr | 3-0 | 25-22, 26-24, 25-23 |
| 2007 | Mjølnir-ÍF | 3-0 | 25-16, 25-21, 25-15 |
| 2008 | SÍ-Mjølnir | 3-1 | 26-24, 25-13, 18-25, 26-24 |
| 2009 | ÍF-SÍ | 3-1 | 25-22, 21-25, 25-17, 25-19 |
| 2010 | SÍ-Mjølnir | 3-1 | 25-23, 25-19, 18-25, 25-19 |

**) Í 2000 var spælt eftir Nordic Score-skipanini*

## Ítróttur um vikuskiftið

**Steypafinalur, vaksin**

19/02 13.30 SÍ-Mjølnir (kvinnur)
19/02 15.30 ÍF-Mjølnir (menn)

**Steypafinalur, yngru**

20/02 13.00 TB-KÍF (gentur 16)
20/02 14.15 SÍ-TB (dreingir 16)
20/02 15.30 Mjølnir/ÍF-TB (kv.ungl.)
20/02 16.45 TBa/Fleyr-TBb/Fleyr (m.u.)
20/02 18.00 SÍ-Ternan (dreingir 14)
20/02 19.15 Ternan-Fleyr (gentur 14)

**Sunset-kappingin**

20/02 14.30 VÍF-Tjaldur
20/02 15.00 Stjørnan-Neistin
20/02 15.00 VB-StÍF

**Atlantic Airways-kappingin**

19/02 17.00 KÍF-StÍF
19/02 17.00 Team Klaksvík-Neistin
20/02 16.00 VÍF-H71